# El-deildin
## á Tekniska Skúla í Tórshavn
## tørvar 1 faklærara

**Vit ynskja at umsøkjarar:**
- hava hug og hegni at arbeiða við ungdómi
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni
- duga at loysa trupulleikar, tá ið á stendur
- eru framfýsnir og kunnu geva íblástur at menna arbeiðsplássið
- eru hugaðir fyri broytingum

**Vit vænta at umsøkjarar hava:**
- sveinabræv sum el-innleggjari ella líknandi
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika

**Vit bjóða:**
- spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning
- møguleika fyri dagføring innan økið

Umsøkjarar, sum hava kunnleika innan IHC/PLC og/ella hava hægri útbúgving, kunnu hava fyrimun.

**Setanaviðurskifti:**
- starvi er fulltíðarstarv at seta 09. august 2010
- lønar og sáttmálaviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Tekniska Lærarafelag

**Umsóknir:**
Umsóknir,saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skulu vera Tekniska Skúla í Tórshavn, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 04. juni 2010.

**Nærri fæst at vita:**
Nærri fæst at vita um starvi við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, starvsfólkaleiðara, tlf. 568070.

**www.tst.fo**
– skapandi umhvørvi



# Farloyvisstørv
## á Vinnuháskúlanum
at undirvísa seinna hálvár 2010 og fyrra hálvár 2011.

Talan er um 2 farloyvisstørv fulla tíð, ella sum parttíðarstørv.

Undirvísingin fevnir serliga um lærugreinarnar skipatøkni, navigatión, og grundlærugreinar, sum alisfrøði, støddfrøði og enskt.

**Førleikakrøv**
Lærarar, sum undirvísa í útbúgvingum eftir galdandi kunngerðum, skulu: Hava útbúgving sum maskinmeistari ella skipsførari, hava 2 ára starvsroyndir og hava staðið bachelorútbúgving frá hægri lærustovni.

Umsøkjari, ið hevur bachelor- ella kandidatútbúgving í einari ella fleiri lærugreinum, kann undirvísa í hesum lærugreinum.

**Løn**
Starvið er lønt sambært sáttmála við felagið maskinskúlalærarar/sjómansskularalærarar og fíggjarmálaráðið.

**Freist**
Umsóknir við avriti av prógvum og CV skulu vera Vinnuháskúlanum í hendi tann 4. juni 2010.

Umsóknin skal sendast til Vinnuháskúlan, Noatún 2, Postsmoga 104, FO-110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Johannes á Brúgv, stjóra.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Nóatún 2 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · vh.fo

# Pf. Birting tekur nú ímóti umsóknum

FØROYABANKI

Føroya Banki hevur stovnað íbirtingarfelag til at betra um umstøðurnar hjá stigtakarum at fremja burðardyggar og nýskapandi ætlanir. Endamálið við felagnum er at seta váðafúsan pening í fyrstu búningarstigini í ætlanum, sum hava góðar møguleikar fyri at skapa vøkstur og avkast.

Birting fer at leggja størsta dentin á at menna ætlanir til fíggingarverd feløg. Síðan tekur Birting seg væntandi burturúr, og eigararnir kunnu søkja sær víðari fígging frá t.d. framtaksgrunnum og íløgufeløgum.

**Fyritreytir**
- Birting skilar sær rætt til at velja minst ein lim í nevndina aftan fyri ætlanina, sum íløga verður gjørd í. Nevnd og stjórn skulu hava viðkomandi fakligar førleikar og royndir.
- Birting væntar, at stigtakarin ger munandi íløgu í ætlanina og brúkar neyðugu tíðina til at menna hana. Nevnd og stjórn verða lønt samsvarandi fíggjarligu vánunum fyri ætlanini.
- Birting treytar sær nakað størri avkast enn vanligt, við tað at talan er um váðafúsan íløgupening.
- Birting miðar ímóti at svara umsøkjarum í seinasta lagi ein mánað eftir, at umsóknin er móttikin. Er neyðugt at leita sær uttanhýsis ráðgeving, kann svartíðin gerast longri.
- Birting ger bert íløgur í ætlanir, sum verða skipaðar sum føroyskt skrásett feløg.

**Krøv til umsóknir**
Umsóknirnar skulu so væl sum gjørligt lýsa ætlanina, sum stigtakarin arbeiðir við, og sum hann ynskir Birting at seta pening í. Umsóknirnar skulu í minst lagi innihalda eina lýsing av:

- Stovnara og/ella eigara
- Møguligum øðrum íleggjarum
- Fíggjarstøðu
- Fíggjarætlan
- Framtíðarmálum

Eru ivamál ella spurningar, ber til at ringja til Corporate Finance í Føroya Banka, tel. 330 330.

**Umsóknir skulu sendast til**
P/f Birting
Føroya Banki, Corporate Finance
Húsagøta 3
100 Tórshavn

**www.foroya.fo**

SENDISTOVAN